# Gerðabók í sambandi við býráðsfund nr. 8/2021

**Dagfesting:** 26.08.2021 kl. 19:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Magni Jøkladal, Eivin Breiðaskarð, Ólavur Larsen og Gudny Vang

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Býráðsskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 33/21 | 20/00466-177 | Eldrasambýlið Vesturstova - umrøða status við arbeiðinum og avbjóðingar í hesum sambandi |
| 34/21 | 21/00235-80 | Vitjan av H. H. Drotningini í Fuglafjarðar kommunu 16. juli 2021 - umbøn um eykajáttan |
| 35/21 | 21/00345-2 | Umsókn frá Heilbrigdi um fígging til eitt útslúsingarheim - "Halfway House" - til rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar |
| 36/21 | 21/00428-34 | Tilmæli í sambandi við setan av sosialdeildarleiðara til Fuglafjarðar kommunu |
| 37/21 | 21/00239-2 | Útstykkingarætlan millum Gjógvará og vegin vestur á Horn |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

33/21

## 20/00466-177 Eldrasambýlið Vesturstova - umrøða status við arbeiðinum og avbjóðingar í hesum sambandi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2021 | 1/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 6/21 |
| 3 Tekniska nevnd | 23.06.2021 | 62/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 24.06.2021 | 31/21 |
| 5 Býráðið | 01.07.2021 | 26/21 |
| 6 Býráðið | 26.08.2021 | 33/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Eldrasambýlið Vesturstova í Fuglairði verður útbygt. Tíðarætlanin fyri liðugtgerð av arbeiðinum er í løtuni 1. mai í ár. Settar eru 2. mió. kr. av til útbyggingina á fíggjarætlanina fyri 2021. Mett verður, at sum nú er halda tíðar- og kostnaðarætlan.<br><br>Nú er komin tann avbjóðingin inn í útbyggingina, at leiðslan í Vesturstovu hevur ynski um at fáa loyftslyftir ísettar bygningin til at lætta um arbeiðsumstøðurnar í sambandi við búfólk, sum eru illa fyri likamliga. Loftslyftir vóru ikki við í upprunaligu projekteringini, ei heldur køkur, sum leiðslan eisini ynskir at fáa útbygdan.<br><br>Arbeiðið vði at fáa ísett loftslyftur er ígongd. Kommunan fíggjar skinnarar á loftinum ímeðan sjálv loftslyftan fer av rakstrinum hjá Nánd. Mett verður, at hvør skinnari kostar 20. tús. kr. pr. Rúm. Talan er um 8 búrúm. Møgulia er ikki neyðugt, at gera øll rúm liðug við loftslyft í ár, men at nakrar lyftir verða gjørdar komandi ár.<br><br>Borgarstjórin ynskir at umrøða status og tær avbjóðingar, sum eru í arbeiðinum.<br><br>**Framhald 15. februar 2021**<br><br>Sosiala nevnd viðgjørdi málið á fundi 8. februar í ár, og tekur nevndin undir við, at arbeitt verður við at fáa ísett loftslyftu-skinnarar í 7 búrúm á Vesturstovu til ein kostnað á kr. 400.400,- uttan motorar og segl. Sosiala nevnd mælir fíggjarnevndini til at taka undir við hesum. |

| | |
|---|---|
| | Fígging er tøk í løtuni til arbeiðið við at fáa ísett loftslyftu-skinnarnarnar, men tað kann koma upp á tal seinni ár, at biðja um eina eykajáttan í sambandi við arbeiðið.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 23. juni 2021**<br>Uppgávan hjá byggifrøðinginum var at fáa til vega fýra búrúm afturat til Vesturstovu frá 12 til 16 búpláss.<br><br>**Staðfestingar og forkanningar hjá teknisku deild**<br>Tá tað koma fleiri búeindir inn, krevur tað meira almen økir so sum stovur og líknandi.<br>Húsið hevði onki starvsfólkarúm. Tey hildu hvílu inni í køkinum.<br>Tað var ein heilt lítil skrivstova við endan á gongini, sum lág sera langt burtur frá og burturgoymd, har heilivágur var goymdur inni.<br><br>**Prosjektið endaði við at innihalda hettar**<br>17 búrúm við egnum wc, eitt búrúm við wc úti á gongini.<br>Nú er starvsfólkarúm, eitt heilivágsrúm og ein nýggj skrivstova, sum alt liggur miðskeiðis í húsinum, nýggj sjónvarpsstova við góðum útsýni og borðstovan er blivin størri.<br>Í kjallaranum er havastova við útgongd til terassur, veitsluhøli við plássi til 40 fólk til borðs til føðingardagar og líknandi, við egnari úthurð, tøkni/húsavarð við egnari úthurð, skolirúm/goymsla/reingerð. Her kunnu tey sjálvi taka sær av at skolda bekkenar, sum í dag verður gjørt í aðrari kommunu.<br><br>**Fíggjarlig viðurskifti**<br>Tekniska deild hevur gjørt eina endaliga fíggjarliga uppgerð av arbeiðnum í sambandi við útbygging av Vesturstovu.<br>Víst verður til fíggjarskjal<br>Í sambandi við útbyggingina, so eru fleiri óvæntaði viðurskifti komin fram. Her er nøkur nevnd.<br><br>**Avsettur peningur til verkætlanina**<br>Í 2019 blivu settar av kr. 6.400.000,-. Nýtsla kr. 2.400.000,-.<br>Í 2020 blivu settar av kr. 7.600.000,-, Nýtsla kr. 4.700.000,-.<br>Í 2021 blivu settar av kr. 2.000.000,-. Nýtsla higartil kr. 3.000.000,-.<br>Samlað avseting til arbeiðið er kr. 16.000.000,-.<br>Samlað nýtsla higartil er **kr. 10.100.000,- v/6,25 % mvg**.<br><br>**Corona**<br>Ein av grundunum til, at peningur loypur av í 2019 og 2020 er Corona. Arbeiðið hevur ligið stilt í fleiri tíðarskeiðum.<br><br>Út frá tilboðum og mettum kostnaði varð mettur samlaður kostnaður **u/mvg kr. 10.780.750,-** sambært tekniska deild. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Mettar meirútreiðslur, sum koma afturat.**<br>**Kommunalar útreiðslur**<br>ABA-anlegg kr. 304.000,- u/mvg.<br>Lyftir kr. 170.000,- u/mvg.<br><br>**TN-Bygging**<br>Avtaluseðlar higartil kr. (11.900.- + 470.521,-)= 482.421,-.<br><br>**Elcon**<br>Avtaluseðlar higartil kr. (70.626,- + 423.319,-)= kr. 493.945,-.<br><br>**Útreiðslur til Nánd**<br>Kalliskipan kr. 250.000,- u/mvg, sum øll hoyrir til Nánd.<br>Lyftir kr. 230.000,- hoyra til Nánd.<br><br>**Niðurstøða um eykajáttan innanfyri karmin áljóðandi kr. 16.000.000,-.**<br><br>Av tí at peningur, sum er játtaður, er fallin burtur yvir ár, so metir umsitingin, at talan er ikki eykajáttan, tí vit halda fíggjarkarmin.<br><br>Tekniska deild metir, at Vesturstova hevur brúk fyri eini eykajáttan á **kr. 3.707.848,-**.<br><br>**Tíðarætlan**<br>Avhendingingardagurin er settur at 1. juli, men roknast kann við nøkrum manglum. Tvey búrúm í hjallaranum, tøknirúm og skolirúm eru ikki umfataði av hesi avhending.<br><br>**Ískoyti til fundin í fíggjarnevndini 24. juni 2021**<br>Tekniska nevnd varð kunnað um fíggjartørvin, og metir hon, at málið skal viðgerðast í býráðnum umvegis sosialu nevnd og fíggjarnevndina.<br><br>**Framhald 25. juni 2021**<br>Fíggjarnevndin umrøddi málið á fundi í gjár 24. juni, og samtykti, at mæla býráðnum til at veita eina eykajáttan á 4. mió. kr. til liðugtgerð av Vesturstovu, sum verður fíggjað av innistandandi og møguligum yvirflytingum. Avhendingardagurin er ásettur til at verða 1. juli í ár við nøkrum manglum, sum ikki verða liðug tá.<br><br>**Framhald 2. juli 2021** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Býráðið samtykti í gjár 1. juli 2021 við 1. viðgerð eina eykajáttan á 4. mió. kr í sambandi við liðugtgerð av eldrasambýlinum Vesturstovu. Býráðið samtykti samtíðis, at beina umbønina um eykajáttanina til 2. viðgerð í býráðnum tann 26. august 2021. | | |
| Bakgrund | Útbyggingin av eldrasambýlinum Vesturstova. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt<br>Arbeiðsumhvørvislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Fundarfrágreiðing og kostnaðarmeting frá Ann Fuglø, byggifrøðingi, dagfestar 20. og 29. januar 2021<br>FK j. nr. 20/00466-228 Dispositiónsroknskapur dagfestur 21. juni 2021_AF/PAP<br>FK j. nr. 20/00466-235 Innanhýsis notat_Samanumtøka um byggingina<br>FK j. nr. 20/00466-237 100_Vesturstova_Útbygging_20210621 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Møguliga |
| | Umsitingarligar | Ja | Møguliga |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at fíggjarnevndin umrøður málið við atliti at teimum avbjóðingum, sum eru við at íseta lyftir og møguliga dagføra køkin, sum ikki vóru við í upprunaligu projekteringini.<br><br>**Tilmæli 15. februar 2021**<br>Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd um at íverkseta arbeiðið við loftslyftu-skinnarunum fyri nevnda kostnað. | | |
| Dagf | 18. januar 2021 og 15. februar 2021 og 23. juni 2021 | | |



**<u>Tekniska nevnd 23. juni 2021:</u>**
Nevndin bleiv kunnað um fíggjartørvin, og metir hon, at málið skal viðgerðast í býráðnum umvegis sosialu nevnd og fíggjarnevnd.

**<u>Fíggjarnevndin 24. juni 2021:</u>**
Fíggjarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til at veita eina eykajáttan á 4. mió. kr. í sambandi við liðugtgerð av eldrasambýlinum Vesturstovu, sum verður fíggjað av

innistandandi og møguligum yvirflytingum. Vert er at leggja dent á, at talan er í høvuðsheitum um manglandi yvirlflyting frá undanfarnu árum og ikki um meirnýtslu.

**Býráðið 01. juli 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 1. viðgerð, at játta eina eykajáttan á 4. mió. kr. til liðugtgerð av eldrasambýlinum Vesturstovu. Býráðið beindi málið víðari til 2. viðgerð.

**Býráðið 26. august 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 2. viðgerð, at játta eina eykajáttan á 4. mió. kr. til liðugtgerð av eldrasambýlinum Vesturstovu, sum verður fíggjað av innistandandi og møguligum yvirflytingum.

6

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**34/21**
**21/00235-80 Vitjan av H. H. Drotningini í Fuglafjarðar kommunu 16. juli 2021 - umbøn um eykajáttan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.06.2021 | 33/21 |
| 2 Býráðið | 01.07.2021 | 29/21 |
| 3 Býráðið | 26.08.2021 | 34/21 |

7

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | H.H. Drotningin vitjar Fuglafjarðar kommunu 16. juli 2021. Fyrireikingarnar eru ígongd og eru væl áleiðis. Játtan er ikki til fyriskipan av drotningavitjanini á fíggjarætlanini fyri 2021 Ein vegleiðandi kostnaðarmeting er gjørd og nærkast 500 tús. kr., sum biðið verður um eykajáttan til.<br><br>Ein møgulig eykajáttan verður fíggjað av innistandandi á økið 120, felagsútreiðslur kommunufyrisitingin.<br><br>**Framhald 25. juni 2021**<br>Fíggjarnevndin viðgjørdi málið í gjár 24. juni, og samtykti at mæla býráðnum til at veita eina eykajáttan á 400 tús. kr. í sambandi við fyrireiking av drotningavitjanini. Harumframt verða nakrar av útreiðslunum í sambandi við fyrireiking fíggjaðar av rakstrinum á fíggjarætlanini fyri 2021, eitt nú asfaltering.<br><br>**Framhald 2. juli 2021**<br>Býráðið samtykti á fundi í gjár 1. juli við 1. viðgerð eina eykajáttan á 400 tús. kr. í sambandi við drotningavitjanina. Býráðið beindi umbønina um eykajáttan í sama viðfangi til 2. viðgerð á býráðsfundi 26. august 2021. |
| Bakgrund | Fyriskipan av drotningavitjan |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Roknskaparverk kommunanna**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Yvirlit yvir útreiðslur í sambandi við vitjan av H.H. Drotningini í Fuglafirði 16. juli 2021, dagfest 23. juni 2021** |

| | |
|---|---|
| | **Skjøl við yvirliti yvir tíðarætlan og innihald í mun til einstøku vitjanarstøðini** |
| Viðgerð | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til at veita nevndu eykajáttan. | | |
| Dagf | 23. juni 2021 | | |

**<u>Fíggjarnevndin 24. juni 2021:</u>**
Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at veita eina eykajáttan í sambandi við drotningavitjanina á 400 tús. kr., sum verður fíggja av innistandandi.

**<u>Býráðið 01. juli 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og við 1. viðgerð veita eina eykajáttan á 400 tús. kr í sambandi við drotningavitjanina. Býráðið beindi málið til 2. viðgerð.



**<u>Býráðið 26. august 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 2. viðgerð, at veita eina eykajáttan á 400 tús. kr. í sambandi við drotningavitjanina, sum verður fíggjað av innistandandi.

## 35/21
## 21/00345-2 Umsókn frá Heilbrigdi um fígging til eitt útslúsingarheim - "Halfway House" - til rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 07.06.2021 | 17/21 |
| 2 Býráðið | 26.08.2021 | 35/21 |

### Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Sosialu nevnd. |
| Stutt lýsing | Heilbrigdi søkir um fíggjarligan rakstrarstuðul til eitt útslúsingarheim fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar, sum hava verið í «Minnesota-viðgerð» og skulu út aftur í samfelagið. Talan er um leigu av húsi í 3 hæddum við 13 kømrum í Tórshavn til endamáli. Árligi rakstrarkostnaðurin av útslúsingarheiminum er umleið 1. mió. kr., harav skal Fuglafjarðar kommuna gjalda árliga umleið 30 tús. kr. rakstrarstuðli, um umsóknin verður játta.<br><br>Henda umsókn frá Heilbrigdi er eisini viðgjørd í Kommunufelagnum fyrr í ár, har niðurstøðan varð, at kommunurnar allarhelst ikki hava heimild til at stuðla tílíkari umsókn um fastan árligan rakstrarstuðul. Men Kommunufelagið ynskti, at hvør einstøk kommuna tók støðu til umsóknina.<br><br>**Framhald 16. juli 2021**<br>Sosiala nevnd viðgjørdi hetta mál á fundi 7. juni í ár, og samtykti ikki at veita umsóknini stuðul, tí talan er um árligan rakstrarstuðul, sum kommunur ikki hava heimild til at játta og sum er málsøki hjá landinum.<br><br>Men sosiala nevnd umrøddi á fundinum problematikkin í málinum, har tað eru markamót millum land og kommunur í hesum máli, og tí ynskti sosiala nevnd at beina málið til víðari kunning og umrøðu á býráðsfundi. |
| Bakgrund | Umsókn frá Heilbrigdi. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 2019 um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Umsókn frá Heilbrigdi, dagfest 28. mai 2021**<br>**Frágreiðing um Minnesota-viðgerðina** |

9

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til at stuðla við einari fastari minni upphædd, heldur enn einum árligum rakstrarstuðli, sum kann verða kr. 3.000,- og fíggja av rakstrarstaði 290.<br><br>**Nýtt tilmæli 16. juli 2021**<br>Sosiala nevnd ynskir hetta mál sum kunning og umrøðu á býráðsfundinum. | | |
| Dagf | 2. juni 2021/16. juli 2021 | | |

<u>**Sosiala nevnd 07. juni 2021:**</u>
Sosiala nevnd samtykti ikki at ganga umsóknini frá Heilbrigdi á møti, men umrødddi problematikkin í hesum málinum, har tað eru markamót millum land og kommunur, tá tað snýr seg um stuðulsskipanir til fólk, sum hava rúsevnistrupulleikar. Í hesum sambandi er tað fíggjarliga ábyrgdarøki hjá landinum, har stuðulin til Heilbrigdi er á løgtingsfíggjarlógini. Sosiala nevnd samtykti, at beina málið til víðari umrøðu í sambandi við fyrstkomandi býráðsfund.



<u>**Býráðið 26. august 2021:**</u>
Býráðið umrøddi málið og ynskti tað tikið upp av Kommunufelagnum.

**36/21**
**21/00428-34 Tilmæli í sambandi við setan av sosialdeildarleiðara til Fuglafjarðar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.08.2021 | 39/21 |
| 2 Býráðið | 26.08.2021 | 36/21 |

**Tilráðing**

11

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini/býráðnum | | |
| Stutt lýsing | Hetta mál varð viðgjørt fyri afturlatnum hurðum sambært § 26, stk. 1 í kommunustýrislógini og § 1, 2. petti í fundarskipanini hjá Fuglafjarðar býráð. | | |
| Bakgrund | | | |
| Grundarlag | | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | | | |
| Dagf | | | |

## 37/21
## 21/00239-2 Útstykkingarætlan millum Gjógvará og vegin vestur á Horn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.04.2021 | 29/21 |
| 2 Býráðið | 26.04.2021 | 14/21 |
| 3 Tekniska nevnd | 23.08.2021 | 76/21 |
| 4 Býráðið | 26.08.2021 | 37/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsitingin arbeiðir støðugt við einum bústaðarpolitikki fyri Fuglafjarðar kommunu. Arbeiðið fevnir millum annað um at gera lokalplanir fyri ymisk bústaðarøkir í kommununi. Útstykkingarætlanir skulu vera í trá við bústaðarpolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu.<br><br>**Útstykkingarplanur vesturi á Horn**<br>Tekniska deild hevur gjørt eitt uppskot til útstykkingarplan á økinum millu Gjógvará og vegin vestur á Horn.<br>Talan er um grundøkir til bústaðarbygging, har pláss er fyri tveimum grundøkjum omanfyri vegin, og 9 grundstykkjum niðanfyri vegin.<br>Fýra av grundøkjunum hava eina serskylda atkomu. Hetta gevur møguleika fyri tveimum grundstykkjarekkjum.<br>Tó er eitt alternativt uppskot gjørt, har 8 grundstykkir eru niðanfyri vegin.<br>Grundøkini eru áleið 400 til 500 m2.<br><br>**Serstøk byggisamtykt fyri økið og lokalplanur**<br>Neyðugt er at arbeiða við eini serstakari byggisamtykt fyri sama økið.<br>Økið er soleiðis hátta, at innari parturin av útstykkingini er egnað til eittplanshús, meðan tann eystari parturin av økinum er egnaður til sethús í tveimum hæddum.<br>Neyðugt verður eisini at taka atlit til útsýni hjá verandi grannaognum, og at útsýnisviðurskiftini hjá eigarum á nýggju útstykkingini verða so góð sum tilber.<br>Økið liggur tætt uppá Gjógvará, sum er sera náttúruvakurt, og júst hesi viðurskifti seta stór krøv til útstykkingina, bæði tá viðvíkur støðd og hædd av sethúsum, vegaføringum og estetikki.<br>Sum dømi kann nevnast, at markamótið millum grannar og oman ímóti ánni eigur at verða runnavøkstur ístaðin fyri garðar. |

| | |
|---|---|
| | Tá avgerð er tikin um, hvussu økið skal skipast, verður farið undir at gera lokalplan og serstaka byggisamtykt fyri økið.<br><br>**Framhald 22. apríl 2021**<br>Tekniska nevnd viðgjørdi málið á fundi 15. apríl í ár, har nevndin mælti til at arbeiða víðari við uppskotinum við 10 grundstykkjum og ein lokalplan fyri økið. Til kunning og umrøðu hjá býráðnum<br><br>**Framhald til fundin í teknisku nevnd 23. august 2021**<br>Umsitingin hevur arbeitt við verkætlanini við atliti til uppskot til broytta byggisamtykt/lokalplan fyri økið. Her verða byggifelt og planeringshøddir tilskilaði.<br>Ein nágreinulig uppmáting er gjørd av útstykkingarøkinum, soleiðis at tilber at gera tvørskurðir oman ígjøgnum lendi frá vegnum og oman í ánna.<br>Skitsan við 10 grundstykkjum er gjørd um til eina digitaliseraða plantekning, sum eisini er ein matrikulplanur. Hesin verður sendur til Umhvørvisstovuna til matrikuleringar.<br><br>Arbeitt hevur verið við at prosjekera tekniskar leiðingar í lendi, og gera útbjóðingartilfar, soleiðis at arbeiðið er klárt at bjóða út, so skjótt sum tey matrikuleru viðurskiftini eru avgreidd.<br><br>**Fyrireiking til kloakk í sambandi við útstykkingina**<br>Umsitingin mælir til at bjóða kloakkarbeiðið út frá útstykkingini og oman í eitt felags reinsiverk, og síðani leiða skittvatnskloakkina út í kommunala kloakk á Hornavegi. Á henda hátt verða vit frammanfyri, soleiðis at tá klárt er at fara undir sjálvt útstykkingararbeiðið, so er forarbeiðið við íbindingini til kloakkini avgreitt.<br>Skittvatnskloakkin frá sethúsunum omanfyri vegin eru ikki í lagi. Hetta verður tikið hond um, tá vegurin framvið nýggju útstykkingini verður dagførdur.<br><br>**Framhald til fundin í býráðnum 26. August 2021**<br>Teknisk nevnd viðgjørdi málið 23. august 2021 og samtykti matrikulplanin fyri økið millum Gjógvará og vegin vestur á Horn, og eitt minni økið omanfyri sama veg við teirri broyting, at vegaføringin verður 6,0 m vegur og 2,0 m gongubreyt í ovara borð, tvs. at gongubreytin í niðara borð á 2,0 m verður tikin burtur við atliti til sparingar, og at byggjaríðið ikki kemur ov langt oman við atliti til stóran hæddarmun.<br>Tekniska deild hevur tikið hædd fyri at varðveita økið vestanvert sum fríøki, soleiðis at tilber at gera spælipláss og møguleikar til annað frítíðarvirksemi.<br>Eisini samtykti tekniska nevnd, at økið omanfyri vegin verður broytt frá at verða tvey grundstykkir til at verða eitt størri grundøkið til raðhús, sum verða bygt eftir lendinum niðurtrappað. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Fyri at skunda undir verkætlanina, so samtykti tekniska nevnd at bjóða kloakkarbeiðið út beinanvegin frá útstykkingini og oman til reinsiverkið við Hornavegin, soleiðis at tá matrikuleringin og broyting av byggisamtyktini er góðkend, so er klárt at binda kloakkina í.<br><br>Tað sum býráðið skal taka støðu til er fylgjandi<br>1. Góðkenning av matrikulplanurin<br>2. Góðkenning av ávegis uppskoti til ásetingar til broytta byggisamtykt/lokalplan<br>3. At góðkenna kloakkprosjektið, og at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð beinanvegin</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Bústaðurpolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu og ynski um at gera fleiri útstykkingar til fjølbroytta bústaðarbygging.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Byggisamtyktin<br>BK17<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 21/00239-1 Tekniska deild_Uppskot til útstykkingarætlan<br>FK j. nr. 21/00239-21 Matrikultekning dagførd 23082021<br>FK j. nr. 21/00239-22 Byggifeltir, plantekning dagførd 2308201<br>FK j. nr. 21/00239-23 Regn- og skittvatnsplanur, dagførdur 23082021<br>FK j nr. 21/00239-28 Lokalplanur fyri útstykkingina vesturi á Horn</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir nevndini til at velja annað av fyriliggjani uppskotum, og at geva teknisku deild heimild til at arbeiða víðari við uppskotinum.<br>Nýtt tilmæli til fundin 23. august 2021<br>Tekniski leiðarin mælir til at góðkenna matrikulplanin, at bjóða kloakkarbeiðið frá útstykkingini út beinanvegin, taka undir við byggifeltunum og planeringshæddum, og taka undir við lokalplanteksti, soleiðis at serstaka byggismtyktin/lokalplanurin kann fara út til hoyring.<br>Nýtt tilmæli til fundin 26. august<br>Tekniski leiðarin og kommunustjórin mæla býráðnum til at taka undir við samtyktini frá teknisku nevnd, dagfest 23. august 2021.</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| Dagf | 12. apríl 2021.<br>23. august 2021.<br>26. august 2021. |

**Tekniska nevnd 15. april 2021:**
Nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti við 10 grundstykkjum. Nevndin mælir eisini til at gera ein lokalplan fyri útstykkingina og gera eina kostnaðarmeting av at byggibúgva grundøkini íroknað planering og tekniska leiðingar. Vegaprosjektið verður ein verkætlan fyri seg.

**Býráðið 26. april 2021:**
Býráðið tók kunningina frá teknisku nevnd um fyrireiking av útstykkingarætlan vestur í Horn/Innandals til eftirtektar, og ynskti at arbeitt verður víðari við at fáa útstykkingarætlanina framda í verki.

**Tekniska nevnd 23. august 2021:**
Nevndin samtyti at broyta vegaføringina til eina vegabreitt á 6,0 m og 2,0 m í ovaraborð, og taka burur markalinjuna fyri grundstykkini omanfyri vegin við tí fyri eyga at bjóða økið út til eitt íbúðarprosjekt. Mælt verður til at uppdeilingin á grundøkjunum í niðara borð verður meira jøvn uppbýtt, og hava nøkunlunda somu støðd. Tikið verður undir við kloakkprosjektinum og at arbeiðið verður bjóða út beinanvegin sum undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar. Tikið verður somuleiðis undir við áleiðis lokalplani fyri økið. 16

**Býráðið 26. august 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og góðkendi matrikulplanin fyri útstykkingina Vestur Innandals umframt ávegis uppskot til broytta byggisamtykt/lokalplan. Harumframt samtykti býráðið, at góðkenna kloakkprosjektið og bjóða arbeiðið út beinanvegin.

Fundurin lokin kl. 20:40.

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Magni Jøkladal

Eivin Breiðaskarð

Ólavur Larsen

Gudny Vang



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo